**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1630.**
**Tíðarskeið: 3-17/8 - 2016**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Sigvald Kristiansen, Marit Pedersen, Jens Arni Thomassen, Regin Kristiansen (fyrru viku), Mourits Mohr Joensen (seinnu viku) og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt varð vekt, tal og longdarbýti skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini vórðu magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa, umframt av øðrum fiskasløgum. Hitin í sjónum varð máldur við miniloggarum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Fóru av Havnini fríggjadagin 5. august kl. 18. Vit byrjaðu eystanfyri á Sandoyarbanka og tóku støðir nær landi eystanfyri tað vikuskiftið. Krokaðu mánadagin 8. august og royndu týsdagin á Nólsoyarbanka. Fóru inn á Havnina at landa mikudagin 10. august, har ein blokkur eisini var umvældur. Tóku síðan støðirnar lidnar eystanfyri frá Suðuroyarbanka og norð á Fugloyartungu og vestureftir á Norðhavið. Tær innastu støðirnar norðanfyri vórðu tiknar sunnudagin 14. august. Endaðu túrin á Mýlingsgrunninum. Landaðu mikudagin 17. august kl. 7 í Havn. Tilsamans vórðu 112 hál tikin, og av teimum vóru 110 góðkend. Veðrið var sum heild gott allan túrin uttan tann dagin, tá vit krokaðu.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan fyri øll fiskasløgini tosk, hýsu og upsa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 23. august. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og lagdar í databasu í seinasta lagi 1. november.

**Fyribilsúrslit:** Tað var minni at fáa av toski í mun til somu tíð í fjør. Nakað tað sama var av hýsu, meðan dupult so nógv var at fáa av upsa. Hetta var smáttfallandi upsi (seiður). Eisini var meira at fáa av stóra kongafiski (S. marinus). Annars verður víst til túrfrágreiðingina fyri túr 1632, har úrslit fyri allan landgrunnin eru víst. Magakanningarnar vístu, at tað var nakað av smáari nebbasild norðan fyri Føroyar. Vit fingu ein merktan tosk. Vit fingu eina sera stóra longu, sum var 172 cm long og vigaði 33 kg. Fiskalistin varð víðkaður við fleiri ryggleysum dýrum í februar 2016, og fyri hesi eyka dýr var sjálvsagt eingin veiða í fjør.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur (aldrar) og magar tikin á túri 1630.

| FISKASLAG | KG 2016<br>110 hál | Nytrur | Magar | KG 2015<br>142 hál | Lutfall<br>KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| UPSI | 21098.815 | 774 | 192 | 11510.383 | 2.37 |
| HYSA | 8882.345 | 678 | 143 | 12020.043 | 0.95 |
| SVARTKJAFTUR | 8702.647 | 20 | | 9775.082 | 1.15 |
| S. VIVIPARUS | 5704.919 | | | 6790.496 | 1.08 |
| S. MARINUS | 4432.322 | | | 2366.249 | 2.42 |
| HVITINGSBRODIR | 3486.152 | | | 6961.713 | 0.65 |
| GULLAKSUR | 3388.318 | | | 5872.454 | 0.74 |
| MAKRELUR | 2693.780 | | | 1931.466 | 1.80 |
| LONGA | 2652.477 | 116 | 27 | 3971.887 | 0.86 |
| TOSKUR | 2611.710 | 603 | 162 | 5153.117 | 0.65 |
| SILD | 1319.166 | | | 994.940 | 1.71 |
| HVITINGUR | 1125.783 | | | 1608.593 | 0.90 |
| BLALONGA | 734.023 | 48 | 15 | 626.210 | 1.51 |
| TUNGA | 523.593 | | | 893.281 | 0.76 |
| HAVMUS | 485.257 | | | 405.472 | 1.54 |
| BROSMA | 406.049 | 65 | 20 | 556.240 | 0.94 |
| SVARTKALVI | 363.739 | 24 | 24 | 371.294 | 1.26 |
| TINDASKOETA | 309.985 | | | 234.915 | 1.70 |
| HVALSPYGGJ | 281.830 | | | | |
| REYDSPROEKA | 244.988 | | | 418.175 | 0.76 |
| KNURRHANI | 237.677 | | | 282.701 | 1.09 |
| HAVTASKA | 193.176 | | | 282.635 | 0.88 |
| PORIFERA | 134.778 | | | | |
| SILVUR MURTUR | 121.806 | | | 400.143 | 0.39 |
| KJAFTSVARTI HAVUR | 103.846 | | | 86.770 | 1.54 |
| SKADDUR FISKUR | 76.384 | | | | |
| SANDSPROEKA (LL) | 70.311 | | | 147.374 | 0.62 |
| GAMAL FISKUR | 68.262 | | | | |
| S. MENTELLA | 67.695 | | | 183.154 | 0.48 |
| HVASSASPREK | 66.469 | | | 117.092 | 0.73 |
| LOLIGO | 65.092 | | | 135.769 | 0.62 |
| SKOETA(BATIS) | 63.830 | | | 84.045 | 0.98 |
| LYRUR | 55.455 | 7 | | 75.666 | 0.95 |
| JAKUPSSKEL | 53.731 | | | 12.614 | 5.50 |
| LITLA BROSMA | 50.401 | | | 99.949 | 0.65 |
| ELEDONE | 48.557 | | | 0.906 | 69.19 |
| STEINBITUR | 39.335 | | | 49.497 | 1.03 |

**Talva 1**. Veiða, og nytrur (aldrar) og magar tikin á túri 1630 – framhald.

| FISKASLAG | KG 2016<br>110 hál | Nytrur | Magar | KG 2015<br>142 hál | Lutfall<br>KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| LALLA | 39.019 | | | 78.901 | 0.64 |
| HALAHVASSA SKOETA | 35.080 | | | 40.400 | 1.12 |
| ECHINIDAE(IGULKER) | 28.869 | | | | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 28.515 | | | 138.363 | 0.27 |
| BLAGOMUR | 26.750 | | | 33.500 | 1.03 |
| LYCODES ENDIPLEURISTCTUS | 18.450 | | | 32.328 | 0.74 |
| LYSINGUR | 14.985 | 1 | 1 | 1.540 | 12.56 |
| ROSSAMAKRELUR | 13.962 | | | 9.638 | 1.87 |
| KALVI | 12.100 | | | 30.335 | 0.51 |
| HVITASKOETA | 10.910 | | | 98.582 | 0.14 |
| MEDUSAHØVD | 10.245 | | | | |
| PURPURIGULKER | 5.511 | | | | |
| PHAKELLIA SP | 5.332 | | | | |
| ØDA | 4.249 | | | | |
| GLASKVOYSA | 3.770 | | | 27.502 | 0.18 |
| HOLOTHUROIDEA | 2.740 | | | | |
| GLYSUFISKUR | 2.449 | | | 4.940 | 0.64 |
| ULVFISKUR | 2.076 | | | 2.721 | 0.98 |
| ØDA(DEYD) | 1.420 | | | | |
| GAGGA | 1.208 | | | | |
| GAGGA(DEYD) | 0.992 | | | | |
| KROEKILSKRUTT | 0.826 | | | 2.524 | 0.42 |
| LOPHELIA PERTUSA | 0.811 | | | | |
| GAGGUKRABBI | 0.745 | | | | |
| BIVALVIA | 0.580 | | | | |
| TRØLLAHUMMARI(MUNIDA) | 0.507 | | | 0.052 | 12.59 |
| ASTERIIDAE | 0.386 | | | | |
| REYDA HORNABROSMA | 0.363 | | | | |
| ALCYONIUM | 0.358 | | | | |
| SOLASTERIIDAE | 0.240 | | | | |
| PANDALIDAE | 0.171 | | | | |
| GESTFISKUR | 0.127 | | | | |
| SCLEROCRANGON SP. | 0.061 | | | | |
| PAGURUS PUBESCENS | 0.044 | | | | |
| NEBBASILD | 0.034 | | | | |
| RAEKJA | 0.015 | | | 0.116 | 0.17 |
| TILSAMANS | 71238.603 | 2336 | 584 | | |

**Viðmerkingar:** Fleiri ábøtur á imponator 2 eru neyðugar.

<u>Petur Steingrund</u>